# Tá politiið tømdi hvørja skuffu og hvørt skáp

**TÍÐINDASKRIV** Forlagið Gráfelli gevur nú út bókina »Góðan morgun – tað er politiið« um tann stóra húsarannsóknardagin í Føroyum í november í 1994




Um 9-tíðina um morgunin mikudagin tann 16. november í 1994 bankaði politiið á dyrnar á skrivstovum og heima hjá privatfólki í Føroyum. Fólk fingu at vita, at tey vóru handtikin, skuldsett fyri at hava svikað ímóti landinum, og at politiið hevði fingið loyvi til at rannsaka skrivstovuna ella húsini fyri at fáa fatur á skjølum um skipabygging. Tá dagurin var av, hevði politiið skuldsett 46 fólk fyri svik ella roynd at svika og lagt hald á fleiri tons av pappíri.

Nýggja bókin »Góðan morgun – tað er politiið« lýsir tað, sum hendi upp undir tann stóra rannsóknardagin, sjálvan dagin, og hvat hendi aftaná. Hon er bygd á samrøður við tey, sum skipaðu



*Árni Joensen hevur skrivað bókina um tann stóra rannsóknardagin í 1994*

fyri rannsóknunum, og sum søgdu, at politiið hevði rannsakað uttan at ganga nøkrum ov nær. Millum teirra, sum høvundurin hevur tosað við, eru fyrrverandi fútin Mogens Nepper-Christensen og fyrrverandi ákærin Magnus Møller.

## Sum 11. september

Hon byggir eisini á samrøður við fleiri av teimum, sum blivu rannsakað. Samrøðurnar vísa, at tað var sera ymiskt, sum fólk tóku vitjanina hjá politinum. Onkur hevði roknað við tí, onkur annar tók tað sum eitt upplivilsi, ja næstan sum skemt, meðan onnur kendu seg niðrað og eyðmýkt. Hjá hesum stendur 16. november líka klárur í minninum sum 11. september hjá onkrum øðrum.

Millum teirra, sum greiða frá, hvussu tey minnast dagin, eru Jógvan Páll Lassen, Johan Dahl, Poul Mohr og Mortan Johannesen.

Tað er Árni Joensen, sum hevur skrivað bókina »Góðan morgun – tað er politiið"«. Bókin, sum er 180 blaðsíður við fleiri myndum, kemur í bókabúðirnar tann 16. november.

> **... Hon hevði ongantíð havt nakað við myndugleikarnar at gera, og hon fekk ein rættiligan hvøkk, tá hon sá teir báðar politistarnar á trappuni. Maður hennara var sjómaður og var til skips, og hon ivaðist ikki eitt sekund í, at politiið kom at siga henni frá, at maðurin var sjólátin ella deyður av vanlukku umborð. Hon hevði ofta hoyrt, at gekk skip burtur, ella menn doyðu á sjónum, kom prestur ella politiið við deyðsboðunum.**
>
> (Brot úr bókini)

Sosialurin 341800




JÚNIIK skipar fyri kvinnukvøldið í Bassalt

leygardagin 6 nov. kl. 20.00

Eftir tiltakið er power - shopping í JÚNIIK við 15 % í avsláttri

**Atgongumerki á 75 Kr.** eru at fáa í JÚNIIK, Mc Gavin, Kiosk Steinatún og Pizza kjallarinum

Vit bjóða vælkomst drykk, frukt og sjokulátu umframt eitt sera áhugavert kvøld

**SKRÁ:**
Kristina greiður frá um at fram-heva/ fokuserað upp á tað besta hjá okkum øllum.
Petrina greiður frá um at styla okkum, so vit síggja so gott út sum gjørligt.
Petur Háberg spælir nøkur løg
Mótasýning - Júniik
Petur Háberg spælir nøkur løg
Mc Gavin greiðir frá um hár og makup
Petur Háberg spælir nøkur løg

Júniik
Í miðbýnum | Tel. 32 13 00